# Nú verður avgerðin tikin

**Eftir ætlan skuldi Heðin Mortsen taka støðu til, hvørt hann stillar upp til Fólkatingsvalið ella ikki, seinnapartin hósdagin**

VALEVNI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Enn hevur verið ógreitt, um Heðin Mortensen, nývaldur býráðsformaður í Havn, fer at stilla upp til Fólkatingsvalið 8. februar.

– Tað verður seinnapartin í dag (hósdag, blaðkv.). Tá er fundur avtalaður, og eg skal tosa við flokkin um, hvør tann rætta avgerðin er, segði Heðin Mortensen hósmorgunin.

Hann sigur, at støðan verður tikin útfrá, hvar hann situr júst nú.

– Val hevur júst verið, og nú eri eg valdur býráðsformaður, og tað ætli eg mær eisini at vera. Men ein vil jú altíð stuðla flokkinum hjá sær fyri at tað kann gangast honum best møguligt, so støðan verður tikin út frá hesum.



*Heðin Mortensen skuldi hósdagin taka avgerð, hvørt hann stillar upp fyri Javnaðarflokkin til Fólkatingsvalið ella ikki*
*Savnsmynd*

# Vilja onki siga

Á eykaflokstingi hjá Tjóðveldisflokkinum í desembermánaði varð mælt til, at Tórbjørn Jacobsen varð settur uttan fyri tingbólk floksins. Hetta hevði við sær, at Tórbjørn Jacobsen ikki skuldi fáa rætt til at umboða Tjóðveldisflokkin í nevndum ella øðrum álitissessum valskeiðið út.

Nú Fólkatingsval er útskrivað er enn ógreitt, hvussu verður við framtíðini hjá tjóðveldismann-inum. Karsten Hansen, næstformaður í tingbólki floksins, hevði onga viðmerking, tá hann varð spurdur, um Tórbjørn Jacobsen fór at stilla upp fyri flokkin ella ikki. Roynt varð eisini at fáa fatur á Tórbirni sjálvum, men hann var ikki at hitta.



*Enn er ógreitt, hvussu verður við Tórbirni Jacobsen til Fólkatingsvalið. Tjóðveldisflokkurin hevur onga viðmerking*
*Savnsmynd*


